## Vænta uppsagnir hjá SAS

Í næstan eina viku hava leiðslan í flogfelagnum SAS og umboð fyri partar av starvsfólkinum tingast um lønarviðurskiftini, men fyribils uttan úrslit. Nú er steðgur í samráðingunum, og partarnir eru í bíðistøðu, verður sagt. Starvsfólkini hava boðið sær til at halda frí fimm dagar uttan løn, men tað heldur leiðslan ikki vera nóg mikið. Talsmenn hjá fakfelagnum siga, at kemur einki burtur úr samráðingunum, fer leiðslan at siga meiri enn 300 fólk úr starvi, herav umleið 120 í Danmark. Leiðslan í SAS hevur sagt, at eydnast tað ikki at fáa semju við starvsfólkið um sparingar, má felagið koyra fólk til hús.




## Tingmenn ov langa summarfrítíð

Formaðurin í sosialdemokratiska tingbólkinum í Fólkatinginum heldur, at tinglimir hava ov langa summarfrítíð. Sum er heldur tingið summarfrí í fýra mánaðir, men Carsten Hansen vísir á, at tað er ein leivd frá teirri tíðini, tá flestu tingmenn vóru bøndur ella góðseigarar og máttu fáa tíð til at taka sær av garðinum og at heysta grøðina. Hendan tíðin er farin, og í dag ber tað væl til at stytta summarfrítíðina hjá fólkstingslimunum ein mánað, sigur Carsten Hansen við DR. Hann sigur, at á hvørjum ári hópa tingmál seg upp beint undan frítíðini. Var frítíðin stytt, hevði tingið havt betri tíð til viðgerðirnar, sigur formaðurin í tí sosialdemokratiska tingbólkinum.

# Anfinn hyggur frameftir

*Heldur enn at stilla landsstýrisfólk til svars fyri tað farna, vil Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, lýta frameftir*



**Formaðurin í fíggjarnevndini letur tað upp í hendurnar á Løgtinginum at gera nakað við meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni**

MEIRNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað stendur nú til Løgtingið at gera av, um málið um meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, skal takast upp og fáa avleiðingar, eftir at landssýrismálanevndin er komin til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin hevur brotið lógina við at hava brúktpeningtilheilsuverkið, áðrenn Løgtingið hevði játtað teir.

Men tað skilst á honum, at sjálvur er hann ikki serliga hugaður at reisa málið.

- Eg haldi, sum bæði fíggjarnevndin og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava kunngjørt, at nú eiga vit at lýta frameftir og at meirnýtsla av hasum slagum eigur ikki koma fyri aftur.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann er sera vælnøgdur við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur staðfest, at meirnýtsla er ikki nakað, sum kemur fyri framyvir.

Anfinn Kallsberg sigur, at skulu vit lýta aftureftir, eru tað so nógv landsstýrisfólk, sum hava brúkt pening, áðrenn hann var játtaður.

- Vit skulu eisini hava í huga, at Hans Pauli Strøm er ein av teimum heilt fáu, sum hava sitið so leingi, at fortíðin tekur hann aftur.

# Stak friðarligt vikuskiftið

**Hóast tvey stór tiltøk hava verið um vikuskiftið, hevur tað verið óvanliga friðarligt, sigur løgreglan**



*Løgreglan hevur havt eitt av sínum allar friðarligastu vikuskiftum*

LØGREGLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevur verið heilt fitt av fólki í býnum í nátt og tað hevur viðhvørt borgað fyri yvirarbeiði til løgregluna.

Men tað hevur tað ikki gjørt hetta vikuskiftið, tí tað hevur verið stak friðarligt.

Á Varmakeldu í Fuglafirði var tað einasta, ið fekk røring í, tað, at nøkur ungfólk vóru lopin á blámaan at svimja og eygnavitni stúrdu fyri trygdini og boðaðu løgregluni frá, so at tey kundu fáast upp á turt aftur og tað fingust tey.

Í Havn var Asfalt og í tí sambandi vóru SSP-fólk í býnum, men tey høvdu einki at gera, tí tey hava skrivað í síni frágreiðing, at tað var stak friðarligt.

SSP er eitt tvørfakligt samstarv ímillum Skúla, Sosialar mndugleikar og Politi.

Endamálið við samstarvinum er at savna og samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið, sum kunnu fyribyrgja kriminaliteti, og sum kunnu hjálpa teimum, ið onkursvegna eru komin í eina keðiliga støðu við atliti at harðskapi, rúsevnum, lógarbrotum, óhóskandi og niðurbrótandi atburði v.m.

Men fyrrapartin í gjár varð boðað frá herverki og stuldri. Løgreglan hevur ein illgruna um, at samanhangur er ímillum hesi misbrotini, tí tey eru framd í eini beinari linju av Sundsvegnum Yvir ímillum Gilja.

Her hava herverksmenn brotið tveir rútar í einum kampingvogni og hava eisini steinað eftir honum, so at hann hevur fingið fitt av skaða. Tað er eisini brotið inn í ein bil, har ein fiskitráða er stolin og fólk hava eisini verið í einum øðrum bili og róta.

Í hesum sambandi frættir løgreglan fegin frá fólki, sum hava sæð okkurt illgrunavert har um vegir.